

*Hóast Sóley Mikkelsen í løtum fann stórspælið fram, so var hetta ikki nóg mikið hjá VÍF, sum at enda mátti geva skarvin yvir móti viljasterku VB-kvinnunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

VÍF-VB 26-29 (13-16):

# VB helt høvdinum kalt

**Við trý mála sigri í Vestmanna hevur VB skapt sær eitt sera gott útgangsstøði undan seinnu hálvfinalunum, har VÍF veruliga skal spíla seg út, skulu tær røkka finaluni**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Fyri triðju ferð í ár og fyri aðru ferð innan fáar vikur vitjaðu kvinnurnar hjá VB í Vestmanna mikukvøldið. Hesaferð var tað fyrra hálvfinalan í steypakappingini, sum stóð á skránni. Ein kapping, sum VÍF vann í 99, 01 og 02, meðan VB stóð sum vinnarin í fjør eftir finalusigur á júst VÍF. Og so kann leggjast afturat, at VB umframt hendan sigurin eisini var í tveimum finalum á rað í 2000 og 2001 uttan at vinna.

Tí var tað tvey lið, sum hesi seinastu árini hava skapt sær eina stolta steypatraditión føroyskum kvinnuhondbólti, sum fóru á vøllin, og tí var spenningurin eisini stóru um, hvørt teirra skuldi vinna seg fram til finaluna, har oddaliðið, Stjørnan, eftir øllum at døma verður mótstøðuliðið.

Og serliga hjá VÍF mundi steypakappingin nú hava alstóran týdning. Síðani farð varð undir endaspælið, hevur liðið tapt fyri bæði VB og Stjørnuni, og tí tykist oddasessurin í løtuni at vera eitt mál, sum tær ongan møguleika hava at røkka.

Men hóast hetta, so var tað VB, sum tóktist betri tendrað, tá dysturin varð blástur ígongd. Tær megnaðu heilt skjótt at fáa sær eina lítla leiðslu, og so ráddi um at halda fast í hesari. VÍF kom tó skjótt á rætta lagi, og eitt nú tóktist leikferðin í løtum at vera væl hægri, enn hon var tað í Klaksík herfyri, men kortini gekst sera striltið at fanga VB aftur. Ikki minst tí VB í fyrra hálvleiki hevði eina sera væl upplagda Daivu Toumaite, sum ferð eftir ferð megnaði at stjóta síni sermerktu lumpisligu skot inn í meskarnar hjá VÍF.

## Mansverjur

Tað fór tó at álvara at sansa at hjá VB, tá Ioana Rápa av álvara kom í rætta skothýrin. Knallharða vinstrahondin tóktist hava funnið neyvleikan, sum hon fleiri ferðir hevur saknað síðani hon kom aftur úr burðarfarloyvinum, og tá skot hennara sita soleiðis, sum tey gjørdu tað hesa løtua, so er ikki stórvegis hjá nøkrum málverja at gera.

Einastas loysnin, sum tóktist gjørlig hjá VB, var at fara undir mansverju av stórskjúttanum, og seinastu løtuna undan steðginum gjørdi hetta eisini góðan mun. Sóley Mikkelsen megnaði í ávísan mun at gera sær dælt av plássinum, sum mansverjan av Ioanu gav, men hetta vigaði tó ikki upp fyri missinum í so máta, og so kundi VB aftur toga seg avstað. Beint fyri steðgin stóð somikið sum 11-16 á máltalvuni, men tvey skjót mál frá VÍF í seinasta minuttinum góvu teimum tó eina vón um, at hetta kanska skuldi fara at ganga kortini.

Og hampuliga skjótt í seinna hálvleiki stóð eisini greitt, at tær kanska høvdu nakað at hava vónina í. Verjan tóktist í øllum førum nógv tættari nú, enn hon gjørdi tað fyri steðgin, og var tað ikki fyri knallhørðu skotini og gjøgnumbrotsstyrkina hjá Aukse Vysniaskaite, so kundi hendan løtan spælt munandi verri av fyri gestirnar, enn hon í veruleikanum gjørdi. Og júst avrik hennara fekk nú eisini VÍF til at seta mansverju ígongd.

## Kaldara liðið vann

Og so blivu áskoðararnir vitni til ein sannan gysara seinastu løtuna. Við hjálp av mansverjuni og til tíðir stórspæli frá Sóley Mikkelsen eydnaðist VÍF at kjálkast heilt upp ímóti VB, men treisku gestirnir noktaðu at geva skarvin yvir. hvørja ferð VÍF tóktist skula taka seinasta fetið upp á javnleikin, svaraði VB aftur, og knappar tíggju minuttir fyri leiklok tóktist VÍF hava útspælt sín leiklut. Tvær fylgjandi útvísingar til fyri Nikolinu og síðani Ioanu góvu VB møguleikan at økja munin upp í fýra mál, men tríggjar minuttir fyri leiklok fekk VÍF aftur ein seinasta møguleika.

VÍF hevði longu minkað niður í tvey mál, tá Margreth Augustinussen fekk tveir minuttir. Og takið í høllini mundi næstan farið uppfrá, tá Fríða Marjunardóttir varð leikt leys mitt fyri – og brendi. Við einum leikara í undirtali megnaði VB í eftirfylgjandi mótálopinum at vinna sær eitt málgevandi brotskast, og tá VÍF so mest sum alt fyri eitt tveitti bóltin burtur aftur, kundi ein annars væl spælandi Gurið Mortensen renna einsamøll avstað, og so munaði tað lítið, at VÍF minkaði niður til 26-29 í seinastu sekundunum.

Bara tað at vinna í Vági man undir øllum umstøðum vera ein sera møtumikil uppgáva hjá gula liðnum, sum heilt víst hevði ætlað sær eitt betri útgangsstøði undan seinnu hálvfinaluni. Og ikki minst man VÍF iðra seg um, at tær soleiðis regulert dummaðu seg seinastu tveir minuttirnar í hesum dystinum. Varð høvdið hildið nóg kalt hesa løtuna, vildi talan møguliga verið um javnleik, og í øllum førum ikki tey trý málini, sum nú eru á muni.

Men júst tað at halda høvdið kalt seinastu løturnar av dystinum, er ein so ómetaliga týðandi eginleiki í hondbólti, og tað er nakað, sum VB av álvara dugdi at gera sær dælt av. Í so máta tykist gullárið í fjør hava ment leikararnar sera nógv á sálarliga økinum, og tað er ein eginleiki, sum kann verða gull verdur, og sum í øllum førum tykist hava tryggjað teimum hálvan annan fótin inn um gáttina til steypafinaluna.

### Dysturin í tølum

**VÍF-VB 26-29 (13-16)**
**Støður í dystinum:**
10 min: 5-5
20 min: 8-10
40 min: 19-21
50 min: 23-25
**Málskjúttar**
**VÍF:** Ioana Rápa 7(3), Sóley Mikkelsen 6, Fríða Marjunardóttir 5, Jacklin Durhuus 4, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 2, Eydna Joensen 1, Irina Radovici 1
**VB:** Diava Toumaite 8(1), Gurið Mortensen 8, Aukse Vysniaskaite 7(3), Rannvá Augustinussen 3, Leila Jespersen 2, Margreth Augustinussen 1
**Brotskøst:** VÍF 3, VB 5
**Útvísingar:** VÍF 5, VB 2
**Dómarar úr Kyndli:** Geir Wardum & Gunnar Greggoriussen. Onkur ivamál vilja altíð vera í einum somikið tøttum dysti, men høvdu sum heild eitt gott tak um dystin.



VÍF-StÍF 24-25 (12-12):

# Skerdir strandingar við yvirlutan

**Uttan tveir av avgjørt týdningarmestu leikarum sínum eydnaðist StÍF kortini at vinna tepran sigur í fyrru hálvfinaluni móti VÍF**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*



*Tað gjørdist eins intenst og dramatiskt, sum tað plagar at verða, tá VÍF og StÍF enn einaferð hittust í steypakappingini mikukvøldið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Enn einaferð tykist tað skula gerast til eitt satt drama, nú mansliðini hjá VÍF og StÍF eru í holt við at avgreiða spurningin um, hvør teirra skal eiga annað umboðið í mansfinaluni í Coca-Cola kappingini.

Fyrri dysturin millum liðini endaði við teprum eitt-máls sigri til strandingarnar, men tað verður eftir øllum at døma eitt rættiliga skert meistaralið, sum skal royna at verja leiðsluna í seinna dystinum, og sum kunnugt, so er eitt mál ikki tann heilt stóra leiðslan í hondbólti, tá tað framvegis eru 60 harðir og vónandi spennandi minuttir eftir at leika.

## Dejan í hopla

Bæði liðini vóru annars nakað skerd undan fyrru hálvfinaluni. Skaðar á landsliðsferðini høvdu viðført, at hvørki Sveinur Justinussen hjá StÍF ella Eli Müller hjá VÍF vóru tøkir til dystin, og fyrstu løtuni bendi alt á, at saknurin í hesum var munandi størri hjá gestunum. Ikki minst tí VÍF í Dejan Lacok hevur ein framúrskarandi málverja at kappast við Eli Müller, og serliga fyrstu løtuna tóktist hann geva greiðar ábendingar um, at hann eisini at takast við í tosið, tá menn meta um, hvør man vera stinnasti málverjin í landinum.

Tað skuldu ganga nærum tíggju minuttir, áðrenn Sverri Justinussen sum fyrsti StÍF-leikarin megnaði at skora í málið hjá Dejan, men tá tað fyrst var brostið fyri nev, so togaðu strandingar skjótt. 20 minuttir inn í dystin høvdu teir togað leiðsluna hjá VÍF aftur, og so var av álvara lagt upp til vanliga gysaran, sum plagar at vera, tá hesi bæði hittast.

## Marian úti

Men vónirnar hjá StÍF fingu eitt álvarsligt skot fyri bógvin um júst hetta mundið. Tí brádliga small Marian Cirloganescu í gólvið, eftir at hann hevði vent sær á eftir einum bólti. Eftir øllum at døma, »hekk« fóturin fastur í gólvinum, tá hann snaraði sær, og tað stóð alt fyri eitt greitt, at tað var ikki hugsingur hjá honum um at halda fram í dystinum.

Hvussu álvarsligur skaðin er, bar ikki til at fáa staðfest, áðrenn blaðið fór til prentingar, men í StÍF vóna tey uttan iva, at talan »bara« er um onkur toygd liðbond, men sum støðan tók seg út á vøllinum, so er fryktandi fyri, at tað er nógv meira álvarsligt enn sum so.

## VÍF koppaði

Tað gav ein brádligan elddóp til Rasmus Magnusson, sum nú var einsamallur um at verja málið seinastu 40 týdningarmiklu minuttirnar.

Hann kom tó bæði skjótt og væl inn í dystin, men fyrstu løtuna eftir steðgin tóktist missurin hjá StÍF at gerast í meira lagi. Tvær reisur eydnaðist VÍF at toga seg nøkur mál avstað, men báður ferðirnar vóru strandingar skjótir eftir teimum, og seinastu tíggju minuttirnar var dramatikkurin í hæddini.

Heilt fitt av fólki av Skálafjørðinum hevði leitað sær til Vestmanna, og úr teirra vongi í høllini rungaðu StÍF-rópini, meðan óvanliga fámæltu vestmenningarnir av og á royndu at muta ímóti.

Og á vøllinum var spenningurin ikki minni. Intensiteturin var í hæddini, og viðhvørt var hondbóltsspælið tað eisini. Ikki minst mundi takið flogið av høllini, tá Harald Bjørgvin óvanliga frekt legði ein bólt in ní feltið, har Agnar Nielsen kom flúgvandi og skumpaði í málið til 24-24. Ein detalja, sum vanliga plagar at verða roynd, tá sigurin væl og virðiliga er tryggjaður, og sum flestu allir venjarar munnu ynskja har piparið grør, tá talan er um somikið spennandi uppgerðir, sum hesa.

Men sjálvt hetta var tó ikki nóg mikið. Fá sekund undan leikloki smekkaði Mihai Marinescu – sum annars var ein brandur í verjuni – til, og tá bólturin smoygdi sær inn um stólpan, var sigurin vísur hjá StÍF. Við bert tveimum sekundum eftir á klokkuni, var ov seint hjá VÍF at svara aftur, og í so máta var tað eitt óvanliga óneyðug reytt kort, sum Mihai bjargaði sær hesa løtuna, tá hann av øllum alvi royndi at fora fyri, at vestmenningarnir kundu geva bóltin upp. Eitt reytt kort, sum kostar honum leikbann næsta dystin hjá StÍF, men í so máta munnu teir prísa sær lukkuliga fyri, at hesin verður í landskappingini móti H71. Tí sum landið liggur, so mugu teir í øllum førum vera Svein og Marian fyri uttan í seinnu hálvfinaluni, og tá eru ráðini til at missa enn fleiri av grundstuðlunum ikki serliga góð. Tí tað er í øllum førum væntandi, at VÍF fer at leggja heilt nógv fyri, tá teir vitja á Skála komandi leygardag.

### Dysturin í tølum

**VÍF-StÍF 24-25 (12-12)**
Støður í dystinum
10 min: 4-1
20 min: 7-6
40 min: 17-16
50 min: 20-20
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 5, Áki G. Olsen 4, John Zachariassen 3, Agnar Joensen 3, Ingi Olsen 3, Piti Negru 3, Fríðbjørn Seloy 1
**StÍF:** Mihai Marinescu 6, Alexandur Johansen 4(3), Sverri Justinussen 4, Pauli Hansen 4, Bent Djurhuus 2, Artur Johansen 2, Jón Rasmussen 1
**Brotskøst:** StÍF 5
**Útvísingar:** VÍF 6, StÍF 4
**Diskvalifikatión:** VÍF 1 (3X2 minuttir), StÍF 1 (Beinleiðis reytt)
**Dómarar úr Kyndli:** Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen. Høvdu ein góðan dyst, og ikki minst undirstrikaði dagurin fyrimunirnar av, at tað eru tvey ymisk dómarapør, sum døma, tá talan er um tveir somikið týdningarmiklar dystir.å



*Marian Cirloganescu varð borin av vøllinum í fyrra hálvleiki, og vandi tykist vera fyri, at tað fer at ganga drúgv tíð, áðrenn hann aftur er førur fyri at spæla*
*Mynd: Álvur Haraldsen*